## Greiðari lánsreglur

Tey seinastu árini eru nógvir grønlendskir útróðrarmenn komnir í fíggjarligt óføri, tí teir hava tikið lán við høgari rentu fyri at gjalda tað upprunaliga lánið til bátin, sum teir í mongum førum ikki høvdu møguleikar fyri at rinda aftur. Landsstýrið hevur nú skotið upp at broyta reglurnar, so treytirnar fyri at fáa lán verða herdar, samstundis sum mishald skal hava við sær, at lánið verður sagt upp og báturin seldur á tvingsilssølu.



## Bøta um trygdina

Bæði í Danmark og Noregi hava bankarnir sett sær fyri at bøta um trygdina við heimabankaskipanini. Í Danmark hava teldusníkar brotið trygdarskipaninar og stolið rættiliga nógvar pengar, men nú fer Finansrådet at forða tí. Í Noregi flutti ein kvinna 500.000 krónur á skeiva kontu, tí hon trýsti eitt tal ov nógv, tá hon skuldi skriva kontunummarið. Í framtíðini skal skipanin siga frá, um viðskiftafólkið trýsta skeivt.

# Guds bankamaður til Føroya

**Mikudagin kemur maðurin, sum er kendur sum Guds bankamaður, til Føroya, har ið hann skal hava møtir og fyrilestrar. Talan er um George El Khoury úr Libanon**

VINNULÍV
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*



*George El Khoury fer at halda fyrilestur fyri vinnulívsfólkum í Kelduni leygardagin*

Hann hevur skrivað bók um sítt egna lív, sum inniheldur ymiskar pólar. Í bókini stendur, at hann vaks upp undir sera fátækssligum korum. Familjan mátti stríðast fyri at fáa mat í munnin. Tí varð George tíðliga blakaður út í arbeiðslívið, har ið hann kaffi og atgongumerki á einari kappríðingarbreyt. Pengarnir fóru til húsarhaldið. Sostatt lærdi George longu tíðliga at stríða seg fram í lívinum. Hann gjørdist besti næmingur í skúlanum og fekk sostatt fría skúlagongd. Tí fekk hann eina góða útbúgving, hóast familjan ikki hevði fortreytir fyri at senda børnini til hægri útbúgving.

### Stríddi seg fram

George minnist serliga væl eina uppliving sum heilt ungur, tá ið hann sá ein ríkan mann býta í eitt skínandi reytt súrepli. Slíkt marglæti høvdu tey ikki ráð til heima hjá teimum. Men tá tók hann avgerð um, at hann ikki vildi liva í fátækradømi restina av lívinum.

Hann vann seg fram í lívinum, og hann fekk starv í einum banka. George hevði eina ómettandi trongd til lívið og æru í mannaeygum. Hann vann seg fram í arbeiðnum, og eitt ríkt men flýggjasligt kærleikslív. Hann giftist við einari kvinnu og fekk fýra børn við henni. Men tá ið hann fekk møguleikan at gerast leiðari í einum banka í Belgia, rýmdi hann frá konu og børnum og settist niður í Evropa.

George menti eina nýggja útláns- og innlánsskipan, sum nógvir bankar tóku til sín. Nýggja skipanin varð mett at vera slóðbrótandi, og George El Khoury gjørdist eitt stórt navn innan bankaheimin. Hann gjørdist ein partur av leiðsluni í høvuðsskrivstovuni í London. Hann livdi eitt lív sum kendur og vælumtóktur maður. Tó kendi hann seg tóman innaní.

### Sonurin fekk pápan til trúgv

Ein dagin kom sonurin Walid til London, har ið hann fór at lesa. Hann búði hjá pápanum, men teir høvdu eitt sera strongt samband, tí at pápin hevði ikki sæð sonin í nógv ár. Ein dagin kom sonurin til trúgv á Jesus, og sambandið broyttist millum feðgarnar. Walid tosaði nú einans um sína trúgv og vísti ferð eftir ferð á, at pápin mátti skifta lívskós. Hetta strongdi George, sum ikki orkaði álopini á samvitskuna.

Eftir eitt dømi um tað, sum hann sjálvur kallar fyri eitt greitt undur, kom George eisini til trúgv. Lívið hjá honum broytist umfatandi, og hann misti starvið í bankanum. George fór at ganga á bíbliuskúla, og gjørdist evangelistur. Hann hevur síðani ferðast runt og greitt frá um sítt lív og sína trúgv. Í dag er hann aftur giftur við fyrrverandi konu sínari, sum hann eigur fýra børn við. Hann er fluttur aftur til Libanon, har ið hann rekur eina kirkju. Kring heimin er hann vorðin kendur sum ”Bankamaður Guds”, og hann ferðast runt heimin ein stóran part av árinum. Føroyingar fáa nú høvi at hoyra hann, tá ið hann skal vera í Miðlahúsinum, Oasuni og Kelduni.

*Kelda: The Banker of God*

## FAKTA

**Heiðursmerki og avrik:**

- 2 heiðursmedaljur úr Fraklandi.
- Stovnari og forstjóri í 2 bankum í London.
- Stovnari og forstjóri í banka í Bahrain.
- Stovnari og í leiðsluni fyri ein banka í Houston-Texas- USA.
- Limur í nevndini fyri 3 bankar í London, Geneva og Beirut.
- Formaður í nevndini fyri 3 bankar.
- Stýrisfromaður fyri A.C.I.Lebanon-Financial Market Association (80 bankar).
- Stýrisformaður av Inter-Arab Cambist Assosiation (250 bankar).
- Limur av The International Bankers Association F.I.B.A.
- Limur av The Arab Bank ers Association F.A.B.A.

## Bankamaður Guds heldur fyrilestur í Kelduni

VINNULÍV
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Leygardagin verður skeið fyri vinnulívsmenn, har ið George El Khoury kemur at halda fyrilestur. Eisini kemur ein danskari sum eitur Bertel Kristiansen at tosa.

- Søgan um ein múgvandi persón, sum kom til frelsu sum 63 ára gamal.

Ein persónur sum hevði alt, sum kann hugsast, men tó tørvaði alt. Stovnari av ”Spirit Channel”, ein satelit sjónvarpsrás, sum sendir í Miðeystri, Norðurafrika og Europa, stendur í faldarinum frá fyrireikarunum.

Bertel Kristiansen er danskur vinnulívsmaður, sum handlar við fiski í Afrika. Hann greiðir frá, hvussu trúgv kann flyta fjøll, tá man arbeiðir millum muslimar.

*Fyrireikari: ICCC Føroyar*

*George El Khoury fer at halda fyrilestur fyri vinnulívsfólkum í Kelduni leygardagin*

